# Hvannaberg á veg til Danmarkar



Nýggi vágs rækjutrolarin er nú á veg til Skagen í Danmarkar til eftirlit, men um einar 14 dagar verður hann klárur at fara til fiskiskap. Skipið loysti úr Reykjavík um middagsleitið mikudag-in og skipari er Eyðun Johannesen úr Sandvík.

Nú er aftur ein rækjutrolari komin til Vágs. Tað eru Jákup Olsen, sum hevur keypt ein brúktan rækjutrolara úr Íslandi. Trolarin er yvirtikin, hevur fingið føroyskt flagg og er skrásettur í Vági. Hann eitur nú »Hvannaberg«.

Jákup Olsen, sigur, at trolarin er keyptur fyri 14 milliónir frá einum felag í Íslandi, sum fór á húsagang. Men sjálvur hevur trolarin verið skrásettur á San Vincent. Hann hevur mest fiskað á Flemish Cap, men onkran túr hevur hann verið við Svalbarð. Tá ið íslendska felagið fór á húsagang, varð báturin lagdur í eitt norskt felag, haðani hann nú er keyptur til Vágs.

Hvannaberg er annar trolarin innan stutta tíð, sum er komin afturat í føroyska fiskiflotan og hann er saman við Ocean Pride ikki heilt vælkomin av teimum gomlu rækjutrolarunum í landinum.

Felagið Rækjuskip er hart í móti politikkinum hjá landsstýrinum, har teir hava givið nýggj fyribils rækjuloyvi, fyri betri at gagnnýta okkara fiskidagar á fjarleiðunum.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og sólglottar, men eisini okkurt æl-ið, partvís vátasletting-ur. Hitin millum 2 og 5 stig, um náttina um frostmarkið.




**Veðrið leygardagin:**
Fyrst gul til stívt andøvsgul av eystri, seinni lot av ymsum ættum. Okkurt regn- ella vátaslettingsælið, og hitin millum 2 og 4 stig, um náttina um frostmarkið.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig, um náttina niður til frostmarkið.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Fyrst upp í ein strúk av landsynningi og regn. Týsdagin hækkar hann upp í norðan og minkar vindin nakað. Sólglottar, men eisini okkurt regnella vátakavaælið. Hitin millum 2 og 6 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷15 |
| Nuuk | ÷5 |
| Qaqortoq | ÷1 |
| Ammassalik | ÷6 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 8 |
| Tromsø | ÷3 |
| Bergen | 2 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannah. | 7 |
| Helsinki | 7 |
| Moskva | 15 |
| Berlin | 15 |
| Warzawa | 16 |
| Kiev | 16 |
| Bukarest | 15 |
| Paris | 11 |
| Madrid | 16 |
| Róm | 16 |
| Malorca | 19 |
| Athen | 17 |
| Malta | – |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 14 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 22 |
| New York | 9 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | 27 |
| Panama | – |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 19 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 981 hPa. eystan fyri Føroyar fer í landnyrðing.




Lágtrýstið við Vestur-Noreg fer í landnyrðing og lágtrýstið vestan fyri Írland fer eysturefir. Køld luft verður framvegis yvir Føroyum komandi dagarnar.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 04/04 kl. $06^{00}$–05/04 kl. $06^{00}$. Hitin í gjár: 4,0°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 15,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,8 mm – mált frá 04/04 kl. $06^{00}$–05/04 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í apríl: 31,1 mm

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG



12. MAÐUR
http://soccer.at/faroes

## VESTFALLSKYRRINDI

1. apríl: Fyrra kvarter
5. apríl: Mánin næstur jørðini
8. apríl: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2001

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 5. apr | 05.11 | 17.35 | 04.11 | 16.35 | 04.26 | 16.50 | 07.11 | 19.35 | 08.11 | 20.35 | 03.26 | 15.50 | 02.26 | 14.50 | 05.26 | 17.50 | 06.26 | 18.50 | 04.56 | 17.20 | 06.11 | 18.35 |
| 6. apr | 05.59 | 18.24 | 04.59 | 17.24 | 05.14 | 17.39 | 07.59 | 20.24 | 08.59 | 21.24 | 04.14 | 16.39 | 03.14 | 15.39 | 06.14 | 18.39 | 07.14 | 19.39 | 05.44 | 18.09 | 06.59 | 19.24 |
| 7. apr | 06.50 | 19.14 | 05.50 | 18.14 | 06.05 | 18.29 | 08.50 | 21.14 | 09.50 | 22.14 | 05.05 | 17.29 | 04.05 | 16.29 | 07.05 | 19.29 | 08.05 | 20.29 | 06.35 | 18.59 | 07.50 | 20.14 |
| 8. apr | 07.38 | 20.02 | 06.38 | 19.02 | 06.53 | 19.17 | 09.38 | 22.02 | 10.38 | 23.02 | 05.53 | 18.17 | 04.53 | 17.17 | 07.53 | 20.17 | 08.53 | 21.17 | 07.23 | 19.47 | 08.38 | 21.02 |